Mjølnir-ÍF 3-1 (25-19, 20-25, 25-23, 26-24):

# ÍF er uppsteðgað

**Eftir mest sum fullkomið einaveldið í 10 umfør, eru fuglfirðingar nú í vanda fyri at missa oddasessin í bestu mansdeildini**

MANSFLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Tað er einki at siga til, um flogbóltslagið er vánaligt í Fuglafirði í hesum døgum. Mest sum alt heyst hevur tosið mest snúð seg um, nær – og ikki hvør – fuglfirðingar skuldu tryggja sær meistaraheitið í mansflogbólti, men nú er brádliga álvarsligur vandi fyri, at hetta verður av ongum.

Eftir tíggju sigrar á rað, har liðið tóktist vera í serflokki, rendu menninir seg brádliga í eitt tap, tá teir vitjaðu Fram fyri viku síðani, og leygardagin var tað so Mjølnir, sum átti tørn.

### Treiskni gav úrslit

Og kanska var tað júst tapið hjá ÍF fyri Fram, sum viðførdi, at Mjølnir legði so nógv fyri leygardagin. Tað var eins og trúðu teir meira upp á møguleikan, enn teir annars hava gjørt, og tá ÍF eisini mátti vera skadda Bartal Eliasen fyriuttan, var blokkurin ikki eins sterkur, sum hann vanliga er hjá liðnum.

Og hesum dugdu klaksvíkingarnir til fulnar at gera sær dælt av. Frysta settið varð vunnið sannførandi, men eftir at ÍF tók sær av næsta settinum, tóktist gongdin vera vend. Í triðja settinum tóktust teir á oddaliðnum bara at halda fram, og eitt skifti tóktist tað mest sum ein formalitetur, áðrenn eisini hetta varð vunnið, men so setti klaksvíkingar á. Væl stuðlaðir av mongu áskoðarunum i høllini vunnu teir seg støðugt inn á ÍF, og tað eydnaðist eisini at taka sær av settinum, um enn munurin ikki var stórur.

Ivaleyst setti hetta djúp sálarlig spor hjá fuglfirðingum, tí hóast teir eisini í fjórða settinum tóktust hava munin, so megnaðu teir ongan tíð at seta Mjølnir heilt til viks.

Og so endurtók søgan seg. Eftir at ÍF at kalla alt settið hevði veirð á odda, so komu klaksvíkingarnir sum eitt óløgið seinastu bóltarnar. Fyrsti dystarbólturin kiksaði, men tá teir løtu seinni vunnu sær enn ein møguleika var einki at gera hjá ÍF, uttan at geva skarvin yvir.



*Ikki minst í blokkinum vóru klaksvíkingar stinnir, tá teir gjørdust annað liðið á rað, sum basti annars einaráðandi fuglfirðingunum*

*Mynd: SáH*

### Mugu reisast

Við sigrinum syrgdu klaksvíkingar fyri, at spenningur nú av álvara er komin í aftur flogbóltskappingina hjá monnum. Nakað sum annars tóktist óhugsandi fyri bert tveimum vikum síðani, men tvey tap á rað hava í øllum førum staðfest, at ÍF kann takast.

Og spurningurin er so, hvussu hetta hevur ávirkað fuglfirðingarnar. Komandi vikuskifti hava teir tó møguleikan at rætta nakað upp á sjálvsálitið, tá botnliðið úr Fleyr kemur á vitjan, og stendur steypafinalan fyri framman. Ein finala, sum fyri bert tveimum vikum síðani tóktist vera ein avgreiðsluspurningur, men sum eftir seinastu úrslitini tykist vera víðopin, og fyri flogbóltsáhugan í landinum er hetta kanska ikki so heilt galið.

## Holte er við aftur

Bárður Mikkelsen og liðfelaganir høvd um vikuskiftið týðandi uppgávu, tá DHG Odense kom á vitjan. Ikki tí. Í einum endaspælið eru allir dystirnir sjálvsagt av stórum týdningi, men eftir tvey tap í teimum trimum fyrstu dystunum var trýstið av álvara lagt á Holte, sum annars tryggjaði sær danska steypaheitið beint fyri jól.

Og okkurt bendir á, at Bárður og teir nú eru um at koma fyri seg aftur. Móti Odensen gjørdist talan um greiðan 3-0 sigur, og tó at talan serliga í fyrsta settinum var um eina sera javna uppgerð, so var neyvan nakar, sum hevði hug at seta ein fingur á, at talan var um ein uppibornan sigur. Sjálvur sigur Bárður, at taða fyrst og fremst var servutrýstið hjá teimum, sum riggaði væl, umframt at blokkurin eisini vann nógvar bóltar.

Við sigrinum syrgdi Holte fyri, at teir framvegis eru við í gullstríðnum í elituendaspælinum, sum í ár tykist gerast meira javnt, enn tað nakran tíð hevur verið.

Komandi vikuskifti skal Holte spæla móti Gentofte Volley, sum enn ikki hevur fingið stig í endaspælinum, so møguleikin fyri at leggja enn størri trýst á oddin tykist avgjørt vera til staðar.

**-jm**

SÍ-Fram 3-0 (25-20, 25-16, 25-22):

# Sørvingar vilja í oddin

**Fram fekk ikki givið sørvingum stórvegis mótstøðu, tá liðini hittust sunnudagin**

MANSFLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Ein dystur varð leiktur í bestu mansdeildini sunnudagin, tá Fram vitjaði í Sørvági. Eftir tapið hjá Mjølni leygardagin var greitt, at vinnarin her hevði ein møguleika at leggja seg út í oddastríðið, og tí lá eitt hampuligt trýst á pørtunum, tá farið varð á vøllin.

Men tað var hampuliga skjótt, at SÍ hevði gjørt greitt, at hendan dystin ætlaðu teir sær at vinna. Hóast munurin í tølum kanska ikki var so sjónligur, so hekk spælið hjá sørvingum betri saman, og tað tóktist heldur ikki, sum um havnarmenninir høvdu nakað mótvápn, tá teir í løtum vórðu trýstir í botn.

Við sigrinum togaði SÍ seg upp á triðja plássið, har teir í løtuni eru trý stig aftan fyri ÍF á fremsta plássinum. Enn hevur SÍ tó heimadyst til góðar móti fuglfirðingum, eins og talan eisini er um útidyst móti Mjølni, so hóast grundspælið ikki hilnaðist heilt so væl, sum sørvingar annars høvdu ætlað, so er teirra leiklutur langt ífrá liðugur. Ikki minst, tá hugsað verður um, at teir eisini hava møguleikan at verja steypaheitið, sum teir vunnu sær í fjør.

Hetta er annars ikki sørt umvent av gongdini frá seinasta kappingarári. Tá høvdu sørvingar eitt framúr gott grundspæl, sum gjørdi teir til meira ella minni favorittar at taka gullmerkini, men í endaspælinum gekk heilt galið, og alt endaði við, at Fram brádliga hevði sníkt seg fram á oddasessin. Um tað skal eydnast SÍ at sníkja seg í oddin í ár, skulu vit lata vera ósagt, men enn hava teir ikki heilt slept endanum, og so leingi vónin er til staðar, ber ikki til at avskriva liðið.

Hinvegin er lítið at ivast í, at tapið hjá Fram merkit, at teir nú mugu siga endaliga farvæl við FM-heitið. At teir aftur í ár skulu taka øll á bóli, tykist í løtuni dekan ov veruleikafjart, men enn kunnu teir tó fáa eitt avgerandi orð, tá fullmerkini skulu plaserast. Nakað sum teir kanska eisini fingu seinasta vikuskiftið, tá teir gjørdust teir fyrstu at basa ÍF.



H71-VÍF 33-29 (16-14):

# Hoyvíkingar meina tað



*Tað var fyrst og fremst í verjupartinum, at hoyvíkingar tryggjaðu sær sigurin á VÍF, tá teir annað vikuskiftið á rað tóku broddin av einum oddaliði*

*Mynd: Finnur Justinussen*

**Eftir at teir farna vikuskifti bastu Neistanum, var tað hesa ferð VÍF sum átti tørn, og aftur her sýndu hoyvíkingar, at teir ikki bara eru fastir stiggevarar**

MANSHONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

H71 mundi taka øll á bóli, tá teir fyri góðari viku síðani góvu Neistanum bank. Mest nærliggjandi frágreiðingin var kanska, at Neistin í alt ov stóran mun undirmetti mótstøðuna, men tað var helst ikki allur sannleikin.

Í øllum førum vóru vestmenningar ávaraðir, tá teir vitjaðu í Hoyvíkarhøllini leygardagin, men hóast hetta, so broytti tað ikki pettið um úrslitið. H71 vann enn einaferð ein fýramála sigur á einum oddaliðið.

### Vunnu í verjuni

Og tað er einki at ivast í, at hvør største orsøkin til sigurin var. Frá fyrsta bríksli løgdu hoyvíkingar nógv fyri í verjupartinum. Ætlanin var púra greitt at órógva stóru skjúttarnar hjá VÍF, soleiðis at hesir ikki sluppu nóg væl framat, og fyri tað allar mesta eydnaðist hetta eisini. Skotroyndirnar hjá VÍF komu tískil ofta at vera úr nógv størri fjarstøðu enn tríggjametra strikan, og tá hevði ein væl leikandi Levi Nybo sjáldan teir heilt stóru trupulleikarnir av at verja fyri.

Alternativið hjá VÍF kundi uttan iva verið, at størri dentur varð lagdur á vong- og strikuspælið, soleiðis at hoyvíkingar vórðu kroystir í eina meira flata verju, men hetta hendi ongan tíð í nóg stóran mun. Kanska eisini tí vestmenningar als ikki høvdu roknað við eini somikið framrættaðari verju. Mistøkini í álopsspælinum gjørdust alsamt fleiri, soleiðis at hoyvíkingar ferð eftir ferð kundu revsa við skjótálopum.

### Hildu fast

Leingi var gongdin eisini tann, at munurin millum liðini bara vaks javnt og samt, men fram móti endanum av fyrra hálvleiki kom tó vend í. Fyrst og fremst tí Eli Müller í VÍF fann stórspælið fram eina løtu. Einar fýra ferðir bjargaði hann, tá hovyíkingar vóru púrasta leysir, og hetta gjørdu liðfelagar hansara sær dælt av, soleiðis at munurin bert var tvey mál, tá farið varð til hálvleiks.

Tað var kanska væntandi, at hetta eisini skuldi vera byrjanin til eitt satt málrok frá vestmenningunum, men tað hendi tó ongantíð. Eina løtu høvdu hoyvíkingar eitt sindur ilt við at hava tamarhald á Áka Olsen, tá hesin varð sendur á vøllin, men so riggaði aftur. Uppskriftin var framhaldandi hin sama við tøttum og aggressivum verjuspæli, og so við og við fánaðu vestmenningarnir burtur. Spakuliga ásannaðu teir, at hetta var ikki teirra dagur, og tó at teir fingu pyntað nakað um úrslitið seinastu løtuna, so var ongan tíð nakar ivi.

### Landsliðsávirkanin

Sum sgat, so var tað fyrst og fremst í verjupartinum, at hoyvíkingarnir vunnu dystin, men liðið hevur tó meira enn hetta at bjóða uppá. Í álopspartinum var stílurin fyri tað mesta nógv betri, enn hann hevur verið hetta kappingarárið.

Gaman í vóru til tíðir væl hjálptir av eini óvanliga passivari VÍF verju, men ein onnur høvuðsorsøk mundi vera, at Uni Wardum nú er vorðin leikandi venjari, heldur enn bara venjari.

Kanska hevur hann ikki sama kvikleika ella somu skotstyrki sum teir, ið hann dystast ímóti, men hondbóltsevnini lata seg tó ikki fornokta. Fyri tað allar mesta stýrdi hann tí, sum hendi í álopspartinum hjá VÍF, og tað var munandi meira, enn at síggja til troyttur Ingi Olsen megnaði, tá hann royndi seg sum leikandi venjara hjá vestmenningunum.

Yvirhøvur tykist tað eisini so, at landsliðssteðgurin er komin munandi betri við hjá hoyvíkingunum enn hjá VÍF. teir báðir, Bárður Brimvík og Halgir Dahl-Olsen, eru einastu landsliðsleikarar hjá H71, og fyri báðar tykist vera galdandi, at teir í dag eru so væl fyri, sum teir ongan tíð áður hava verið.

Hjá vestmenningum tykist støðan verið júst hin øvugta. Av teimum leikarum, sum VÍF hevði á landsliðnum, tykist tað í løtuni bert vera Áki G. Olsen, sum sýnir spæl í landsliðsflokki. Stuðulsleikarar, sum Ingi og Áki Olsen umframt John Zachariassen vóru allir við í landsdystunum, hóast teir kanska áttu at givið avboð av ymsum ávum. Ivaleyst tekin um, hvussu fegnir teir vildu vera partur av hesum stóru ávbjóðingum, men spurningurin er tó, hvørt tað ikki vildi verið betri fyri VÍF, um teir ikki vóru partur av strævnu dystar- og venjingarskránni, sum landsliðið hevði. Ein skrá, sum nú sær út til at kosta VÍF dýrt.

**Dysturin í tølum**
**H71-VÍF 33-29 (16-14):**
Málskjúttar:
H71: Uni Wardum 8(5), Halgir Dahl-Olesen 6, Johnny Durhuus 6, Christian Eli Zachariasen 4, Bárður Brimvík 3, Niels Viggo Niclasen 3, Annfinnur N. Debess 3
VÍF: Áki G. Olsen 11(7), Agnar Joensen 6, Áki Olsen 4, Daniel Rápa 3, Ólvur Brimnes 3, Petur Frank Joensen 2
Brotskøst: H71 7, VÍF 7
Útvísingar: H71 1, VÍF 3
Diskvalifikatiónir: VÍF 1 (3X2 minuttir)
Dómarar úr Kyndli: Hannis Wardum & Eyðun Samuelsen. Hóast smávegis mistøk, sum neyvan slepst undan, so fingu teir alla tíðina dystin at glíða á bestan hátt.

## Venjarin gjørdist leikandi

**Venjarin hjá H71 hevur tveir teir seinastu dystirnar eisini verið leikandi, og ikki kann sigast annað enn, at úrslitini hava verið góð**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Teir báðar dystirnar, sum H71 higartil hevur leikt í endaspælinum, hevur liðið havt tilgongd av einum nýggjum leikara. Talan er tó ikki um nakran óroyndan leikara, men um venjaran hjá liðnum, Una Wardum, sum undan hesum hevur eina drúgva fortíð sum leikari hjá ávíkavist Neistanum og Kyndli.

Upprunaliga var annars ikki ætlanin, at hann eisini skuldi gera um seg á vøllinum, men nú er kortini viðvent í holuni.

- Orsøkin til hetta er fyrst og fremst, at vit ikki hava so nógv fólk at taka av í løtuni. Talan er eisini í stóran mun um ungar og óroyndar leikarar, og tí hugsaði eg, at um eg við hesum kundi geva nakað av friði og stabiliteti, so mundi tað vera eina roynd vert, heldur Uni fyri, tá vit hittu hann á máli um spurningin.

Og ikki kann sigast annað enn, at væl hevur gingist. Síðani venjarin gjørdist leikandi, hevur liðið vunnið á bæði Neistanum og VÍF, men sjálvur heldur hann tó, at hetta hevur hann ikki so stóran part av æruni fyri.

- Tað er rætt, at tað hevur gingið væl, men tað má vera leikarunum fyri at takka. Hasar báðar dystirnar hava vit fyrst og fremst vunnið í verjuni, og har eri eg als ikki við. Skal eg orka at spæla, so má eg avmarka meg sjálvan, tekur venjari heldur skemtandi til.

Tá vit at enda spyrja Una, um hetta so merkir, at hann eisini í framtíðini ætlar sær at vera ein spælandi partur av føroysku fyrstu deild, er svarið eitt sindur ivandi, hóast úrslitini hava verið góð higartil.

- Tað veit eg ikki. Eg havi sagt leikarunum, at tá eg haldi tað gagnar liðnum, so fari eg at royna, men tú skalt so ikki rokna við, at tað verður í fleiri ár afturat, heldur hann at enda.